# Bygdarráðsfundur

# Hvalbiar Kommuna

**Dagfesting:** 27.11.2024 kl. 17.00

Á fundi: Janus Thomsen
Niels Olaf Eyvindsson
Eir J. Norðberg
Martin í Nesi
Thorstein Thomsen
Poul Laust Christiansen
Heri Norðberg (fyri Ronni Hammer)

Ikki møtt: Ronni Hammer

Skrivari: Janus Thomsen

**1.**
**Uppskot til starvslýsing.**
Claus Olsen, íð tann 01.02.2025 hevur havt farloyvi frá starvinum sum húsavørður í Hvalbiar Skúla, hevur skrivliga boðað frá, at hann ikki kemur í starvið aftur.
**Trivnaðarnevndin 20.11.2024:**
Trivnaðarnevndin hevur gjørt uppskot til starvslýsing, har søkt verður eftir húsavørði fulla tíð. Starvstíðin verðu 20 tímar um vikuna í Hvalbiar skúla og 20 tímar um vikuna til røkt av øðrum bygningum/ognum hjá kommununi.
**Fíggjarnevnd 26.11.2024:**
Ein samd nevnd mælir bygdaráðunum at taka undir við starvslýsingini frá Trivnaðarnevndini.
**Avgerð:**
Samtykt var einmælt at fylgja tilmælinum frá Trivnaðarnevndini og heita á skúlastjóran, Eydnu Danielsen, arbeiðsformannin Ørvur Norðberg og Niels Olaf Eyvindson um at skipa setanarsamrøðurnar og koma við tilráðing til bygdarráðið.

**2.**
**Stuðulsumsókn fra bóltfelagnum Royn.**
Umsókn frá bóltfelagnum Royn um stuðul á kr. 200.000,- fyri 2025.
**Trivnaðar nevnd 17.09.2024:**
Einmælt samd Trivnaðarnevnd mælir bygdaráðunum til at játta kr. 125.000,- eins og undanfarna ár.
**Fíggjarnevnd 23.09.2024:**
Nevndin mælir til at útseta málið til fíggjarnevndarviðgerðina fyri 2025.
Síðani hevur felags fundur verið um fíggjarætlanina fyri 2025, har kr. 125.000,- blivu settar av til stuðul til bóltfelagið Royn.

Avgerð:
Einmælt samtykt at játta bóltfelagnum Royn kr. 125,000.- í stuðli fyri árið 2025.

**3.**
**Stuðulsumsókn frá Suðuroyar Norðara Bjargingarfelag (SNB)**
SNB hevur í telduposti tann 18. november 2024 sent inn umsókn um stuðul fyri árið 2024.
**Fíggjarnevnd 26.11.2024:**
Einmælt samd nevnd mælir bygdaráðnum til at játta stuðul á kr. 50.000,00 í 2024. Stuðulin fyri 2025 til 2028 mælir nevndin til at nýggja bygdarráðið tekur støðu til.
**Avgerð:**
Einmælt samtykt at fylgja tilælinum frá Fíggjarnevndini og játta rakstrarstuðul fyri 2024 á kr. 50.000,00,-

**4.**
**Bátabrúgv í Nesi – innkomið tilboð.**
Meting frá Tangavirkinum er kr. 40-50.000,00,- +MVG fyri at gera eina rampu til bátabrúnna í Nesi.
**Fíggjarnevnd 26.11.2024:**
Einmælt samd nevnd mælir bygdarráðnum til at taka av tilboðnum/metingini frá Tangavirkinum.

Eir J. Norðberg skeyt upp at beina málið aftur í nevnd til at kanna aðrar møguleikar.
**Avgerð:**
Fyrst atkvøtt um tilmælið frá Fíggjarnevndini: 3 atkvøður fyri og sostatt fallið. Heri Norðberg, Eir J. Norðberg, Thorstein Thomsen og Poul Laust Christensen tóku ikki undir við hesum.

Síðani atkvøtt um uppskotið hjá Eir J. Norðberg. Samtykt við 4 atkvøðum fyri. Niels Olaf Eyvindson, Martin í Nesi og Janus Thomsen tóku ikki undir við hesum.

**5.**
**Fíggjarætlan 2025 – 2. viðgerð.**
Rakstarútreiðslurnar eru mettar til kr. 37.541.000,00, íroknað útreiðslur til eldrasamstarvið BHS kr. 10.408.000,00 og afturgjald av skuld kr. 3.000.000,00.
Inntøkurnar eru mettar til kr. 37.208.000,00, harav inntøkan frá eftirlønargjøldum, DIS og FAS er kr. 10.408.000,00 sambart meting frá FMR.
Skattaprosentið verður broytt úr 20,4% til 19,95%, barnafrádrátturin hækkar úr kr. 6.500,00 til kr. 8.000,00. Harumframt verða frítíðarkort upp til kr. 2.000,00 latið børnum og ungum undir 18 ár til luttøku í ítrótti og øðrum frítíðarvirksemi.
**Fíggjarnevndin 26-11-2024**
Nevndin mælir til at góðkenna fíggjarætlanina fyri 2025.
**Avgerð:**
Einmælt samtykt at fylgja tilmælinum frá Fíggjarnevndini.

**6.**
**<u>Eykajáttan 2024 – 1. viðgerð.</u>**
**Fíggjarnevnd 26.11.2024:**
Umsókn um eykajáttan fyri 2024 kr. 9.180.000,00, ið er fíggjað við tøkum peningi.
Nevndin mælir bygdaráðnum til at taka undir við eykajáttanini.
**<u>Avgerð:</u>**
Einmælt samtykt at fylgja tilmælinum frá Fíggjarnevndini.

**7.**
**<u>Hoyringsskriv frá Kommunufelagnum um Løgtingslóg um Suðuroyartunnilin við tilhoyrandi tunnilskervum og vegakervum.</u>**
**Tekniska nevnd 23.11.2024:**
Nevndin mælir bygdarráðnum til at biðja um fund við P/F Suðuroyartunnilin viðv. linjuføringini sum fyriliggur nú.

1. Vegurin má sum minst fara eftir sláttur og dyrkari jørð.
2. Loysnirnar á íbindingar og kommunalar vegir, td. vestanfyri skúlan, so at foreldur ikki verða noydd at koyra allanvegin gjøgnum bygdina aftur, fyri at sleppa út á ringvegin.
3. Vit vilja vita um man kann gera tað soleiðis at náttúran, Eiðini bæði og vøtnini bæði verða ávirkað minst møguligt av hesum og at fólk sum búgva tætt uppá linjuføringina ikki koma at órógvast av hesum, tí tað er í dag friður har hesi fólk búgva, og tað má virðast.
4. Kanna um man kann gera lokarennur, ella langar portalar, sum man kann fáa gras á aftur, har sum tað kemur tætt uppá hús og so at man ikki leggur alt ov gott merki til vegin.

**Vega og havnanevndin 23.11.2024:**
Nevndin mælir bygdarráðnum til at biðja um fund við P/F Suðuroyartunnilin viðv. linjuføringini sum fyriliggur nú.

1. Vegurin má sum minst fara eftir sláttur og dyrkari jørð.
2. Loysnirnar á íbindingar og kommunalar vegir, td. vestanfyri skúlan, so at foreldur ikki verða noydd at koyra allanvegin gjøgnum bygdina aftur, fyri at sleppa út á ringvegin.
3. Vit vilja vita um man kann gera tað soleiðis at náttúran, Eiðini bæði og vøtnini bæði verða ávirkað minst møguligt av hesum og at fólk sum búgva tætt uppá linjuføringina ikki koma at órógvast av hesum, tí tað er í dag friður har hesi fólk búgva, og tað má virðasat.
4. Kanna um man kann gera lokarennur, ella langar portalar, sum man kann fáa gras á aftur, har sum tað kemur tætt uppá hús og so at man ikki leggur alt ov gott merki til vegin.

**<u>Avgerð:</u>**
Einmælt samtykt at umbiðja ein fundi við P/F Suðuroyartunnilin og fáa teir at greiða frá, hví júst teknaða linjuføring er vald. Umframt spyrja P/F Suðuroyartunnilin, um ikki aðrar linjuføringar eru møguligar.

Fundur lokin kl. 18.33

Janus Thomsen     Niels Olaf Eyvindsson     Eir J. Norðberg     Martin í Nesi

Thorstein Thomsen     Poul Laust Christiansen     Heri Norðberg.